


*Adina Petrea úr Tjaldri og Jugoslav Djumic úr Neistanum vóru kosin bestu hondbóltsspælarar í vetur. Her eru tey avmyndað saman við stuðlunum, ið lótu steypini*

Mynd: Álvur Haraldsen

# Fýra ferðir Adina

**HONDBÓLTUR** Fýra ferðir mátti Adina Petrea upp á pallin at taka ímóti silvurskreyti fyri síni avrik

Heri Simonsen

Tað, sum hondbóltsáhugaði kring landið fara at minnast best frá hondbólts-gallaveitsluni í Vestmanna í 2010, eru tvey ting. Hæddarpunktini á veitsluni blivu øll send beinleiðis á Rás2, og ein rumenskur úrmælingar mátti fýra ferðir upp á pallin eftir silvurskreyti.

Fyrsta heiðurin átti Adina Petrea áðrenn veitsluna, tí hon var toppskjútti í Sunset-kappingini. Men aftur at hesum gjørdist hon ársins verjuspælari, ársins álopsspælari og best av øllum, ársins spælari.

Adina segði, at hon var ovurfegin um allan heiðurin, men at tað var sjálvsagt, at heiðurin at verða vald sum besti spælari, vigaði sera tungt.

### Glaður Jugoslav

Neistaspælararnir vóru ovurfegnir, tá tað var kunngjørt, at Jugoslav Djumic gjørdist ársins spælari hjá monnum.

Ein eyðmjúkur Jugoslav segði, at hann sera fegin um heiðurin. Hann undirstrikaði, at hann stórtrívist í Føroyum, og at hann fer ið hvussu er at spæla við Neistanum í minst fimm ár aftrat.

Liðfelagin, David Edvardsen gjørdist ársins álopsspælari, umframt at verða toppskjútti, men hann tordi ikki at lova seg til Neistan í so mong ár, sum Jugoslav Djumic.

heris@sosialurin.fo

## HONDBÓLTSVINNARAR

**Ársins spælarar**
Adina Petrea, Tjaldur
Jugoslav Djumic, Neistin

**Ársins stjørnuskot**
Liljan Djurhuus, VÍF
Bjartur Hansen, VÍF

**Ársins álopsspælarar**
Adina Petrea, Tjaldur
David Edvardsen, Neistin

**Ársins verjuspælarar**
Adina Petrea, Tjaldur
Hans Áki Dal-Christiansen, Kyndil

**Ársins málverjar**
Kristina Griksaite, Stjørnan
Marian Cirluganescu, StÍF

**Ársins venjarar**
Svanna Hanusardóttir & Kári Mortensen, VÍF
Jan Ottosen, KÍF

**Ársins dómarar**
Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen

**Toppskjúttar**
Adina Petrea, Tjaldur
David Edvardsen, Neistin